e-mail: jakup@sosialurin.fo

# Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttarSosialin kanst tú eisini lesa á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Steypið til Havnar

*Munurin kundi nærum ikki verið minni, tá úrslitini av teimum báðum hálvfinalunum millum Kyndil og VÍF vórðu løgd saman. Eittans mál var á muni, og nú verður steypafinalan ein innanhýsis uppgerð millum høvuðsstaðarfeløgini*



*VÍF hevur eina sera sterka verju, men kontanta spælið kostar eisini fleiri útvísingar. Her hava Ingi og Ragnur fingið fatur í Jacob Jónsson*

***Mynd: Álvur Haraldsen***

Jákup Mørk

Kyndil-VÍF 24-24 (13-10)

Tað mundi vera við vónum um ein sera javnan, spennandi og rokmiklan dyst, at mongu áskoðararnir leitaðu sær niðan á Nabb hóskvøldið. Seinna hálvfinalan millum Kyndil og VÍF var á skránni, og mett eftir teimum fýra dystinum, sum liðini higartil í ár høvdu leikt móti hvørjum øðrum, vóru góð útlit fyri 60 sera undirhaldandi minuttum.

Sum nevnt, var hetta fimta ferðin, at liðini skuldu bresta saman, og ongantíð hevði munurin verið størri enn tvey mál, tá avtornaði.

Fyrru hálvfinaluna vann Kyndil við einum málið, 25-24, so hjá VÍF var tvingandi neyðugt at vinna, um teir skuldu gera sær vónir um nakran finaludyst móti Neistanum, sum vann sær annað sætið mikukvøldið.

### Havnarmenn svóvu

At byrja við tóktist tað eisini soleiðis, at vestmenningar vóru nakað grammari enn havnarmenn, og meðan bert Hans Áki tóktist vera vakin fyrstu 10 minuttirnar, kundu vestmenningar vinna sær eina trý mála leiðslu.

Havnarmenninir raknaðu tó við, og við sera góðum verjuspæli og skynsamum álopsspæli, megnaðu teir at skjota fimm mál á rað, áðrenn útiliðið svaraði aftur.

Serliga kundu Regin og Hans Áki hóreiggja sær úti í vinstra borðið, við tað at Johnny og Agnar als ikki høvdu tamarhald á teimum.

Eftir eitt time-out, fingu vestmenningar tó spælið at hanga so nøkunlunda saman aftur, men tað var kortini Kyndil, sum hevði munin restina av hálvleikinum, og fóru teir tískil til hálvleiks við eini trý mála leiðslu.

### Hildið skinnið á nøsini

Henda vardi tó ikki leingi, tí seinni hálvleikur byrjaði á sama hátt sum fyrri. Kyndilsliðið var als ikki komið upp í snúningar, áðrenn vestmenningarnir høvdu fanga teir aftur, men eftir hetta gekk sera, sera javnt á.

Kyndilsliðið helt tó skinnið á nøsini, og hóast vestmenningar fleiri ferð komu upp á javnt seinastu 30 minuttirnar, eyndaðist tað teimum ongantíð at koma fram um kyndilsmenn.

Hinvegin megnaði heimaliðið heldur ongantíð at slíta seg leysan frá vestmenningum. Fleiri ferð vóru teir í yvirtali, men kortini megnaðu vestmenningarnir alla tíðina at svara aftur í málskjótingini.

Sum ikki einaferð var tað Sámal, sum syrgdi fyri flestu málunum, tá hann úr nær um tríggja metra hædd sveiggjaði arminum nakrar ferðir.

Móti endanum hevði Kyndil tó fleiri møguleikar at vinna sær eina avgerandi leiðslu, men í tveimum førum bjargaði Bárður, tá brotskast varð dømt. Tað seinnu ferðina vóru vestmenningar bert fimm á vøllinum, tí bæði Sámal og Ingi høvdu fingið tveir fingrar frá dómaraparinum.

Kyndil megnaði tó einki at fáa burtur úr hesum, men onkursvegna lá betri fyri, tá teir báðir høvdu sitið dómin av sær.

Við tveimum málum frá Jacob Jónssyni eydnaðist tað teimum nú at koma á 24-22, og við tveimum minuttum eftir, var líkt til at dysturin nú var avgjørdur.

Vestmenningar megnaðu tó enn einaferð at koma upp á javnt, men seinasta málið var skotið, tá bert fá sekund vóru eftir at leika, og tá vóru áskoðararnir hjá heimaliðnum langt síðani farnir undir at syngja sigurssangir.

### Sterkir í álopspartinum

Kyndil sýndi við spælinum hóskvøldið, at teir so avgjørt kunnu taka stig frá øllum liðunum í deildini, hóast teir skulu vera meira enn hepnir, um teir skulu fanga oddaliðini í landskappingini aftur.

Í verjuni stóðu teir eins væl, og teir vanliga gera, men tað var serliga í álopsspælinum, at dysturin var vunnin hesu ferðina. So at siga hvørja ferð, farið varð í álop, var tað við stórum umhugsni at bólturin varð tveittur millum leikararnar.

Var møguleiki fyri einum skjótum kontraálopi, varð eisini spælt hareftir, og um ikki, so góvu leikararnir sær stundir til at spæla álopið ígjøgnum, soleiðis at alt ikki skuldi gerast ov fjálturs-stungið.

Vestmenningarnir leiktu tó als ikki nakran vánaligan dyst, men hetta skuldi bara ikki verða teirra dagur. Styrkin hjá liðnum er fyrst og fremst í verjupartinum, men kontanta verjuspælið kostar ofta sera nógvir kreftir, tí leikararnir stóran part av tíðini skulu leika við einum manni færri á vøllinum.

Harumframt hava málverjarnir hjá vestmenningum tann eginleika, at teir taka eina rúgvu av brotskøstum. Seinasta vikuskifti var tað Tjaldur, sum kendi sviðan av hesum, og hóskvøldið mundi Kyndil brent seg eins illa, men alt í alt gjørdust vestmenningar tó ov stuttir.

### FM er eftir

Vestmenningar hava tó onga orsøk at falla í fátt, tí enn eru teir á odda í landskappingini hjá monnum. Sum so hava teir heldur ikki stundir at hanga við høvdinum, tí longu sunnudagin verður aftur stórdystur á skránni, tá StÍF kemur á vitjan í Vestmanna.

Kyndil kann hinvegin byrja at hugsa um, hvussu teir skulu fáa bilbukt við Neistanum, sum higartil hevur liðið omaná, tá liðini bæði hava dystast.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Kyndil: Uni Wardum 6 (2), Regin Petersen 5, Hans Áki Dahl Christiansen 4, Jacob Jónsson 3, Janus Einar Sørensen 3, Rúni Poulsen 2, Leivur Holm 1
VÍF: Sámal Joensen 8 (1), Johnny Joensen 6, Ingi Olsen 5 (2), Martin Hummeland 2, Ragnar Zachariasen 1, Harald Bjørgvin 1, Petur Fr. Joensen 2
**Brotskøst:**
Kyndil 5, VÍF 4
**Útvísingar:**
Kyndil: 3, VÍF 8
**Dómarar úr Neistanum/StÍF:**
Hjalmar Petersen og Pole Hansen

# Páll framdi bragd móti Finnlandi

*Men í undankappingum hevur tað skorist illa ímóti mótstøðulandinum mánadagin*

21. februar verða tað seks ár síðani Allan Simonsen gjørdi fyrsta tvey ára sáttmálan við Fótbóltssambandið. Í fyrstu EM undankappingini var Finnland millum mótstøðulondini, og tað skarst illa hjá føroyingunum.

Finnlendingar vunnu 5–0 á heimavølli 16. november í 1994, og tá teir vitjaðu í kavakløddum Føroyum mikudagin 26. apríl í 1995 gekk aftur av skriðuni hjá føroyingum, sum ikki tóktust samanspældir. Ta ferðina vann Finnland 4–0.

Hetta eru einastu ferðirnar, at Føroyar og Finnland hava spælt altjóða skrásettar landsdystir. Finnlendingar hava skorað níggju mál, og føroyingar hava einki fingið.

### Minnisríkt

Men føroysku spælararnir, sum mánadagin fyri fyrstu ferð skulu spæla altjóða skrásettan landsdyst í januar, nýtast ikki bara at hyggja aftur á ússalig hagtøl ímóti finnlendingum.

Talan var ikki um altjóða skrásettan landsdyst, men tað er merkisvert, at føroyingar eina ferð hava megnað javnleik ímóti einum finskum landsliði. Tað var 27. februar 1991.

Páll Guðlaugsson og hansara menn vóru á venjingarlegu í Portugal. Teir spældu tveir dystir. Annar var ímóti tí norska og hin ímóti tí finska olympiska landsliðnum, sum teir róptu tað. Noreg vann 3–1, meðan úrslitið ímóti Finnlandi var 2–2. Magni Jarnskor javnaði til 1–1 og legði Føroyar á odda 2–1.

Hesa ferð hava finnlendingar ikki stóru útisetastjørnurnar við í Spania. Spælararnir koma bara úr feløgum í Norðurlondum, og tí kunnu vit siga, at úrvalið líkist nógv tí, sum tað var, tá Føroyar og Finnland spældu fyri níggju árum síðani.

Fimm føroyskir spælarar, sum vóru við í Portugal í 1991, eru í hesum døgum við í Spania. Teir eru Jens Martin Knudsen, Allan Mørkøre, Jan Dam og Kurt Mørkøre, sum spældu allar 90 minutt-irnar. Og so Todi Jónsson, sum sat á beinkinum alla tíðina.

JH



# 17 ótrúligir minuttir í Klaksvík

*Eftir 17 ótrúligar minuttir í seinna hálvleiki kunnu klaksvíkingar aftur draga andan nakað léttari. Stjørnan vann ein tryggan sigur á VÍF, og liggur nú aftur einsamalt á odda í landskappingini*

Jákup Mørk

Stjørnan-VÍF 26-19 (12-12)

Tað var ikki sørt, at klaksvíkingar stúrdu undan dystinum móti VÍF. Ja, fleiri høvdu kanska hug at kalla hetta fyri lagnudyst, tí eftir knúsandi ósigurin móti Kyndli fyri hálvari aðru viku síðani, mátti tað nú røkka ella støkka fyri Stjørnuna.

Fór VÍF avstað við stigunum, eins og tær gjørdu seinast, var kappingin aftur víðopin, men hinvegin kundi Stjørnan við einum sigri taka eitt avgerandi fet móti væntaða meistaraheitinum.

### Tyngdi leikararnar

Líkt var eisini til, at spenta støðan vigaði nógv á herðunum hjá klaksvíksgentunum, tá dysturin hóskvøldið varð settur.

Spæl teirra hekk als ikki saman, og vestmannagenturnar gjørdu sær beinan vegin dælt av hesum, og tá máltalvan lýsti 3-6, mundu fleiri áskoðarar helst halda, at tey upplivdu eitt sonevnt »deja-vu«.

Stjørnan kom tó spakuliga inn aftur í dystin, men meginpartin av hálvleikinum vóru tað vestmannagenturnar, sum høvdu munin. Fyrst og fremst var tað Ioana Rápa, sum gjørdi um seg, og hóast klaksvíksgenturnar mansvardu, megnaði hon framhaldandi at fáa bóltin í netið, tá stillað varð upp við tríggja metra kast.

Móti endanum av hálvleikinum fekk Stjørnan endiliga nøsina fram um VÍF, men Ioana megnaði tó aftur at javna støðuna.

### Hamskiftar

Nú veit eg ikki, hvørji boð Stjørnuleikararnir høvdu fingið í hálvleikinum, men í øllum førum varð liðið hamskift, tá tær komu aftur á vøllin.

Í samfullar 17 minuttir hildu tær VÍF frá fatinum, og tá klaksvíksgenturnar sjálvar sendu níggju stjørnuskot í málið hjá Marjuni, var alt avgjørt hesa løtuna.

Eftir tí vit frætta úr Klaksvíkini, riggaði verjan nærum perfekt hesa løtuna, og komu vestmannagenturnar fram við verjuni, vardi Johanna Mikkelsen í málinum fyri.

Hetta er annars fyrsti dysturin hjá Johannu, síðani hon fekk skaða í europa-cup dystunum í heyst, og fekk sanniliga prógvað, at landsliðsvenjarin ikki hevur roknað skeivt, tá hann hevur tikið hana við í bruttohópin til landsliðið.

Seinasta korterið av dystinum fór ferðin aftur av dystinum, og Ioana kundi taka málskjótingina upp aftur, men tá var ov seint, og sigurin hjá heimaliðnum kom ongantíð í vanda.

### Lætt um trýstið

Eftir dystin kundi venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, fegnast saman við leikarunum um, at klaksvíksgenturnar nú aftur hava slitið seg leysar í oddinum.

-hetta var ein ótrúliga týdningarmikil dystur fyri okkum, tí enn ein ósigur kundi viðført, at leikararnir komandi dystirnar fóru gerast alt ov fjáltursstungnar. Nú hava vit aftur skapt okkum eina góðu oddastøðu, soleiðis at trýstið nú liggur á hinum liðunum, segði venjarin við Sosialin eftir dystin.

Ivaleyst er tað eisini rætt, at Stjørnan nú hevur allar trumfarnar á hondini í dystinum um FM-heitið.

Hinvegin stendur ikki so væl til, tá hugsað verður um steypakappingina. Komandi sunnudag skulu tær á heimavølli royna at vinna tapið móti Kyndli aftur. Hetta verður tó ein alt annað enn løtt uppgáva, tí Kyndilskvinnurnar tykjast sera væl koyrandi í løtuni.

Møguliga fer hesin dystur eisini at geva eina ábending um, hvørt hóttanin hjá frá kyndilskvinnunum í FM-stríðnum skal takast í álvara.

### Dysturin í tølum:

**Málskjúttar:**
Stjørnan: Simona Hansen 7 (1), Vesna Tomajek 5 (2), Annika Ljósstein 4 (1), Andrijana Milodanovic 4, Anna K. Samson 3, Jastrid Gullaksen 2
VÍF: Ioana Rápa 14 (3), Jacklin Durhuus 3, Óluvá Poulsen 1, Randi Kúrberg 1
**Brotskøst:**
Stjørnan 5, VÍF 5
**Útvísingar:**
Stjørnan 5, VÍF 3
**Diskvalifikatión:**
Stjørnan 1 (3x2 minuttir)
**Dómarar úr Tjaldur:**
Dánial Hansen og Kári Hansen



*VÍF genturnar mistu fullkomuliga takið fyrstu 17 minuttirnar av seinna hálvleiki, og Stjørnan fekk tá níggju mál á rað*

***Mynd: SáH***

# Sámal heldur seg vera væl fyri

*Gøtumenn hava vant allan vetur, meðan tað í fleiri øðrum feløgum hevur verið rættuliga friðarligt myrku tíðina*

Á yvirlitinum, sum Fótbóltslandsliðið hevur sent út í sambandi við landsliðsferðina niður til Spania, stendur Sámal Joensen at umboða Leiftur í Íslandi, men gøtumaðurin, sum býr á Strondum, er framvegis heima á klettunum, og hann venur framvegis við gomlu liðfeløgunum í Gøtu:

– Eg veit ikki rættuliga enn, nær eg fari til Íslands, men tað verður helst eina ferð seint í mars ella kanska fyrst í apríl. Tað veldst eisini um veðrið. Um tað verður nógvur kavi har yviri, so gerst lítið við fótbóltin á Ólafsfirði, siga teir fyri mær, sum hava verið har yviri. Nú fari eg at vera saman við venjaranum, Jens Martini Knudsen, í meiri enn eina viku, og sjálvsagt fara vit eisini at tosa um Leiftur, sigur Sámal Joensen, sum telist millum sjálvsøgdu miðvallarálitini hjá Allani Simonsen.

### Ymiskar venjingar

Tað er rættuliga ymiskt, hvussu nógv feløgini í Føroyum hava gjørt við fótbóltin í vetur. GÍ man vera tað felagið, sum hevur verið mest nærlagt myrku tíðina, meðan onnur feløg hava valt at lata spælararnar hava frið og hvíla seg.

Á Toftum hava spælararnir havt møguleikan at spæla innandura onkra ferðina hvørja viku. Í gjárkvøldið skuldu teir fyri fyrstu ferð hittast saman við nýggja venjaranum, Jóannesi Jakobsen, og í dag verður av álvara lagt til brots. Tríggir av spælarunum hjá B68 eru í Spania við landsliðnum. Teir eru Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen og so Jan Dam, sum fleiri løgdu til merkis var betri fyri í landsliðsvenjingunum á Svangaskarði tey bæði undanfarnu vikuskiftini, enn hann plagar at vera hesa tíðina á árinum.

– Vit hava vant regluliga síðani eina ferð í november. Vit hava verið nógv í høllini á Kambsdali, og tá veður hevur verið til tað, so hava vit verið á vøllinum í Gøtu. Men tað er ikki fyrrenn nú um mánaðarskiftið, at tað verður farið undir tungu grundvenjingina, sum skal til. At vit hava gjørt ikki so lítið við tað frammanundan átti at gjørt, at sannlíkið var størri at sleppa undan skaðunum, sum nógvir plaga at vera plágaðir av fyrstu vikurnar, tá tunga venjingin er á skránni, sigur Sámal Joensen. Hóast hann heldur seg vera væl fyri, so hevði hann fyri í vetur ætlanir um at verða uppaftur betri fyri so tíðliga á árinum:

– Eg hevði ætlað at runnið nógv einsamallur, men tað hevur ikki ligið fyri. Tað hevur verið nógv at gjørt á skipasmiðjuni á Skála. Vit hava ofta arbeitt langt út á kvøldarnar, og so hevur ikki ligið so væl fyri at runnið.

JH

# Hondbólturin um vikuskiftið

*Eingin landskappingardystur er á skránni hjá kvinnuliðunum, men hinvegin skulu báðar hálvfinalurnar avgreiðast sunnudagin. Hjá monnunum skulu tríggir dystir leikast*

Jákup Mørk

Sum nevnt omanfyri, so verður eingin landskappingardystur í bestu kvinnudeildini leiktur um vikuskiftið. Heilt óáhugavert verður vikuskiftið kortini ikki, tí seinnu hálvfinalurnar skulu avgreiðast, og her er lagt upp til tveir spennandi dystir.

### Kann Stjørnan reisa seg

Størsti spenningurin man helst vera knýttur at, hvussu leikur fer, tá Neistakvinnurnar skulu til Vágs at verja eitt máls leiðsluna, tær vunnu sær í fyrra dystinum.

Hetta er triðja vikuskiftið á rað, at liðini bæði hittast, og hóast Neistin hevur havt munin tey bæði undanfarnu vikuskiftini, so er einki avgjørt í hesum dysti. Hetta er helst eisini seinasti møguleiki hjá VB kvinnunum at ogna sær heiðursmerki, tí í landskappingini hevur tað ikki skorist nóg væl hjá teimum. Spurningurin er so, um hetta er nóg mikið til at koppa neistaliðnum, sum hevur sera stoltar traditiónir í kvinnuhondbólti, og serliga í steypakappingini.

Hin hálvfinalan verður leikt í Klaksvík, har Stjørnan skal royna at hevna sjey mála tapið móti Kyndli fyri tveimum vikum síðani. Stjørnan má helst metast at vera favorittur undan dystinum, tað eru tær so at siga altíð, men spurningurin er, um tey sjey málini ikki verða ein ov stórur biti at gloypa um. Spurningurin er so, um góði seinni hálvleikurin móti VÍF hóskvøldið var ein ávaring til kyndilsliðið um, at tær ikki skulu kenna seg ov tryggar við teimum sjey málunum.

### Oddadystur í Vestmanna

Hjá monnunum tykist serliga dysturin millum VÍF og StÍF at gerast áhugaverdur. Talan er tey bæði liðini, sum alt kappingarárið hava ligið á odda í landskappingini, og fyri bæði liðini er talan um ein dyst, sum kann fáa avgerandi týdning.

Megnar VÍF at koma heilskalað úr dystinum, hava teir um ikki annað fingið eitt sindur av rúmd í oddinum, har StÍF og Neistin hava verið grammastu kappingarneytarnir.

Bæði liðini hava nú bert meistaraheitið at hugsa um, eftir tapini í hálvfinalunum, og tískil skuldu verið góð útlit fyri einum dysti, har liðini bæði geva alt tey eiga, og kanska nakað afturat.

Høllin í Vestmanna skal eisini nýtast leygardagin, tá Neistin fer norður at vitja kollfirðingar. Lítil ivi er um, at Neistin má átaka sær favoritt heitið í hesum dysti, uttan at gera av nógv burtur úr, skuldi neistaliðið kunna vunnið sær ein tryggan sigur í hesum dysti.

Seinasti dysturin hjá monnunm hetta vikuskifti verður í Havn, har Kyndil og H71 skulu royna seg. Hoyvíkingar skulu nokk ikki gera sær tær øgiligu vónirnar um stig í hesum dysti. Stórur munur hevur verið á liðunum alt árið, og verða avrikini hjá Kyndli seinastu dystirnar havd í huga, er lítið at ivast í, at teir er risa favorittar at vinna dystin.